gult4 cyan4 magenta4 svart4



# Toppkarakter til Smyril

**Manningin á Smyrli fekk toppkarakterir, tá ófráboðaðar bjargingarroyndir vóru umborð fríggjadagin**

SAMFERÐSLA

*Edvard Joensen*



*Pauli Larsen, skipari á Smyrli, er sera væl nøgdur við úrslitið av bjargingarroyndini*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Smyril:** Smyril fekk 29 av 30 møguligum stigum, tá ófráboðaðar bjargingarroyndir vóru umborð seinnapartin fríggjadagin. Tríggir mans frá danska Søfartsstyrelsen vóru umborð og gjørdu royndirnar, og teir vóru nøgdir við úrslitið.

Smyril var ikki meira enn komin út um grótkastið í Havn á veg til Suðuroyar seinnapartin fríggjadagin, tá alarmklokkurnar fóru í gongd, og fráboðanin á brúnni vísti, at maður var dottin út.

Manningin, sum júst var komin umborð, var á veg at skaffa, tá alarmurin fór í gongd, greiðir Pauli Larsen, skipari á Smyrli frá.

Tað var at loypa avstað at fáa MOB-bátin (Mand Over Bord) út, og tað gekk bæði skjótt og væl.

– So væl, sigur skiparin, at vit fingu fult stigatal, sum er 10, fyri venjingina.

Á veg suður vórðu tvær aðrar venjingar gjørdar. Ein brandvenjing og ein rýmingarvenjing. Og eisini har stóð manningin á Smyrli royndina. Fyri brandvenjingina góvu donsku eftirlitsmenninir eitt níggjutal, meðan teir góvu 10 fyri rýmingarvenjingina.

Teir tríggir eftirlitsmenninir frá danska Søfartsstyrelsen vilja ikki gera viðmerkingar til úrslitini av slíkum royndum, fyrr enn teir hava latið almennu frágreiðingina frá sær.

Teir vilja tó siga so mikið sum tað, at umborð á Smyrli stóð heilt væl til í dag. Teir komu umborð og skipaðu fyri royndunum, uttan at manningin visti um tað.

Um stigatalvuna, sum gongur frá 0 til 10, siga teir, at verður givið 0-3, verður skipið afturhildið, og boð verða givin um at halda nýggjar venjingar beinanveg.

Verður latið 4-5, verður viðmerking gjørd í eftirlitsbókina um, at her skal gerast betri.

Verður givið 6-10, verða ongar atgerðir gjørdar móti skipinum, sum teir taka til.

– Og vi kan sige, at Smyril bliver ikke tilbageholdt, da vi kommer i havn, sum ein teirra tekur til.




# Ver við til at taka tøk

## fyri Almanna- og heilsumálastýrið

Almanna- og heilsumálastýrið tørvar fulltrúar

Almanna- og heilsumálastýrið, sum umsitur almannamál, heilsumál, íbúðarmál og javnstøðumál, søkir eftir fulltrúum við hægri útbúgving. Møguleiki er fyri einum spennandi starvi, sum tú sjálv/ur ert við til at skapa.

**Høvuðsuppgávur:**
- at ráðgeva deildarstjóra, aðalstjóra og landsstýrismanni
- gerð og ummæli av uppskotum til lógir, kunngerðir og reglugerðir
- málsviðgerð
- luttøka í arbeiðsbólkum og nevndum.

**Vit hava tørv á:**
fulltrúum
- við akademiskari útbúgving: cand. jur, cand. polit., cand oecon, cand merc. ella líknandi
- við áhuga fyri almanna- og/ella heilsuøkinum
- við áhuga fyri at vera við til at byggja upp
- við evnunum at síggja avbjóðingar heldur enn forðingar
- við samstarvsvilja
- við málkunnleika bæði í skrift og talu
- við kunnleika til EDV á brúkarastøði
- við kunnleika til arbeiðstreytirnar í einari politiskari fyrisiting

**Vit bjóða:**
- sjálvstøðugt starv við góðum møguleika at seta egnan dám á starvið.
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur í einum umskiftiligum umhvørvi
- flekstíð
- góðar skeiðs- og eftirútbúgvingarmøguleikar.

Møguleika at søkja hava øll við viðkomandi útbúgving. Fólk, sum eru um at verða liðug við lesnað, eru eisini vælkomin at søkja.

**Lønar- og setanartreytir:**
Setanarøkið fevnir um alt Almanna- og heilsumálastýrið við tilhoyrandi stovnum umframt hini aðalstýrini og Løgmans-skrivstovuna.
Lønar- og setanartreytir sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og viðkomandi yrkisfelag.

Nærri fæst at vita við at seta seg í samband við Turid Arge, deildarstjóra ella Mariu á Dul, virkandi aðalstjóra, tlf. 30 40 50.

**Umsókn:**
Umsókn við avriti av viðkomandi prógvum skal sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
100 Tórshavn

Umsóknarfreistin er 25. maj 2001, kl. 12.00

**Almanna- og heilsumálastýrið**
Starvsfólkadeildin, Eirargarður 2, 100 Tórshavn
Tel 35 40 40, fax 35 40 45, www.ahs.fo


gult5 cyan5 magenta5 svart5




